Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Magnus Rasmussen, løgtingsmaður

Svarari: Bjarni Kárason Petersen, landsstýrismaður í lógarmálum

Evni: Arbeiðs- og uppihaldsloyvi

Spurningar:

1. Hvussu nógv nýggj arbeiðs- og uppihaldsloyvi eru givin higartil í 2025?
2. Hvussu nógv arbeiðs- og uppihaldsloyvi eru endurnýggjað í 2025?
3. Hvussu eru hesi tøl, sammett við trý tey seinastu árini?
4. Verða allar umsóknirnar viðgjørdar líka skjótt, sum áðrenn avgerðarmyndugleikin kom á føroyskar hendur, t.e. sum eftir Fast–Track skipanini?
5. Um ikki, hvørjar eru so orsakirnar, og hvat ætlar landsstýrismaðurin at gera fyri at fáa umsóknirnar viðgjørdar líka skjótt, sum áðrenn avgerðarmyndugleikin kom á føroyskar hendur?

Viðmerkingar:
Tann 1. september í 2024 komu flestu mál innan útlendingaøkið undir føroyskan avgerðarmyndugleika.

Sambært heimasíðuni hjá Løgmálaráðnum merkir broytingin, at allar umsóknir um fyribils uppihalds- og arbeiðsloyvi viðvíkjandi familjusameining, arbeiði (eisini eftir ítróttaravtaluni, Fast-Track-avtaluni og ES-lógini), sjálvstøðugt vinnurekandi, lesandi, starvsnæmingar, granskarar, trúboðarar, umframt samfylgjandi familja teirra og au-pair, verða viðgjørdar av Útlendingastovuni.

Nú gott og væl hálvt ár er liðið síðani hesa broyting, so er áhugavert at vita, hvørt viðgerð og avgreiðsla av arbeiðs- og uppihaldsloyvum verður líka skjótt avgreidd, sum eftir at Fast-Track avtalan varð gjørd á heysti 2021.

Á Løgtingi, 6. juni 2025

Magnus Rasmussen